# ítróttur

Nr. 77 • hósdagur • 24. apríl 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Dejan Lacok til VÍF

**Tvey feløg liggja framvið í løtuni at ogna sær jugoslaviska stórskjúttan Dragisa Stojovic**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*



*Jugoslaviski málverjin, Dejan Lacok, fer at leika við VÍF komandi vetur, har hann skal taka kappingina upp við Eli Muller um málmansplássið í VÍF.*
*Mynd: savnsmynd*

Málverjin hjá Tjaldrinum seinasta vetur, jugoslavin Dejan Lacok, fer komandi kappingarár at leika við VÍF. Partarnir skrivaðu undir sáttmála mánadagin fyri komandi kappingarár

Jugoslaviski málverjin er ein av bestu málverjunum í landinum, og nú hann gjørdist leysur av sínum sáttmála við Tjaldur, hava vestmenningar ligið framvið.

Formaðurin í VÍF, Jógvan Sigurd Poulsen, er fegin um nýggja leikaran í felagnum.

- Hetta verður avgjørt ein styrkur hjá okkum, og fer eisini at økja um kappingina um málmansplássið í felagnum.

Annar av málmonnum í VÍF, løgtinglimurin Bárður Nielsen, hevur ikki eins nógva tíð til hondbóltin longur, og tí hava vestmenningar ikki havt tveir tøkar málverjar til allar venjingarnar seinasta vetur. Hetta verður ikki ein trupulleiki longur, nú Dejan Lacok fer at taka kappingina upp við Eli Muller um plássið í málinum hjá VÍF komandi vetur.

## Óvist við Dragisa Stojovic

Tað er greitt, at stórskjúttin, Dragisa Stojovic, ikki verður í Tjaldrinum komandi kappingarár. Sum skilst er toppskjúttin í ár áhugaður at halda fram at leika hondbólt í Føroyum, og fleiri feløg hava ligið framvið at ogna sær hann.

Í løtuni er tvey feløg upp á tal, men jugoslavin fer ikki at taka støðu fyrr enn í juni mána, hvaðani hann leikar komandi kappingarár.

# Endurtøka av finaluni í fjør

LUTAKAST
*Páll Holm Johannesen*

Mánakvøldið var lutakastið til fjórðingsfinalurnar í kappingini um Løgmanssteypið. Lutakastið háttaði seg so, at finalistarnir í fjør, HB og NSÍ, møtast í fjórðingsfinaluni.

Vinnararnir av kappingini í 2001, B36, skulu á Mølina á Eiði, har EB/Streymur tekur ímóti teimum.

Gøtumenn fáa vitjan av FS Vágum, meðan í seinasta dystinum bresta B68 og KÍ saman á Svangaskarið.

Fjórðingsfinalurnar verða leiktar leygardagin 3.mei. 10 mei verður fyrra hálvfinala leikt, og 18 mei seinna hálvfinala. Finalan verður sum undanfarin ár á ólavsøku 29.juli.

**Fjórðingsfinalurnar:**
GÍ-FS Vágar
EB/Streymur-B36
NSÍ-HB
B68-KÍ



*Finalistarnir í fjør, NSÍ og HB, bresta saman í fjórðingsfinaluni í ár. Fjórðingfinalurnar verða leiktar leygardagin 3. mei.*




# Tjaldur byrjar av nýggjum

**Runavíkingar vilja ikki koma við nakrari ábending um, hvussu verður við mansliðnum komandi vetur.**

HONDBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Hjá hondbóltsfelagnum Tjaldur hevur gingið rættiliga illa seinastu árini. Felagið hevur í vetur havt eitt vána kappingarár hjá bæði kvinnum og monnum, og nú hevur leiðslan tikið vánaligu úrslitini til eftirtektar.

– Vit hava satsa fullkomiliga skeivt seinastu árini, har alt ov nógv orka er nýtt til útlendingarnar, men hetta fer at broytast til komandi ár, sigur Rúni Joensen, nevndarlimur í Tjaldur.

Tað er longu greitt, at eingir útlendingar vera á liðunum komandi vetur.

– Vit fara at byrja á botninum aftur, og seta allir kreftirnar inn til ungdómsarbeiðið í felagnum, greiðir Runi Joensen frá.

## Seta ungdómsvenjara

Sum liður í at menna ungdómsarbeiðið í felagnum, ætla runavíkingar at seta ein ungdómsvenjara í starv. Tjaldur hevur samband við nakrar skandinavar í løtuni, men framvegis er onki ítøkiligt komið burturúr.

-Fyri at kunna seta leikarar við á 1.liðnum hjá bæði kvinnum og monnum er neyðugt við einum mennandi ungdómsarbeiði, og frá komandi vetur verða tað deildirnar frá unglingum og niðureftir, ið verða raðfestar hægst her í felagnum, sigur Rúni Joensen

## Óvist við mansliðnum

Tað er greitt, at kvinnurnar hjá Tjaldri leika í 2.deild komandi ár, men enn óvist hvussu verður við monnunum. Formaðurin ásannar eisini at tað verður sera torført at hava eitt lið í fremstu deildini, nú eingir útlendingar verða at finna í felagnum, men hann vil ikki koma við nakrar greiðari ábending um, hvussu verður við 1. manslíðið hjá felagnum.

- Aðalfundurin hjá Hondbóltssambandinum verður 10. mei, og tá fara vit at tosa við hondbóltssambandið um støðuna, og tá verður greiða fingin í málinum, fortelur Runi Joensen.

Ein av trupulleikunum hjá felagnum hevur verið, at tað hava verið útlendingarnir og eldri leikarar, ið hava borið 1.manslið, meðan fáar ungar kreftir hava verið settar til.

## Nýggj nevnd

Eins og Hondbóltssambandið, so fer Tjaldur eisini at hava aðalfund í mei mánað. Tað er longu greitt, at bæði formaðurin og næstformaðurin fara at takka fyri seg, og lata aðrar kreftir sleppa frammat.

– Vit hava verið í nevndini seinastu trý árini, og tað hevur verið ein strævin tíð, og nú felagið byrjar av nýggjum, meta vit tað vera skilagott at lata onnur folk sleppa framat, sigur Rúni Joensen at enda



# Stórur stykismunur

**Ein av kappingarneytunum hjá KÍ um meistaraheitið, B36, fekk bert javnt í Vágum, og hevur tískil fingið ringa byrjan á kappingarárið**

KVINNUR
*Páll Holm Johannesen*




Eftir, at tvey umfør eru leikt í kvinnudeildini, kann tað róliga staðfestast, at tað tykist vera rættiliga stórur munur á botni og oddi. KÍ-kvinnurnar hava leikt tveir dystir ímóti feløgum, sum helst fara at mynda botnin í deildini, og higartil hava klaksvíkskvinnur ikki skotið færri enn tjúgu mál í tveimum dystum.

Tað er ikki nógv fráliðið í kappingini, men hesi hagtøl eru ræðandi, og neyvan mennandi fyri føroyskan kvinnufótbólt.

## B36 ringa byrjan

B36 var undan kappingini mett at vera ein kappingarneytunum hjá KÍ um gullmerkini, men higartil hevur havnarliðið staðið seg illa. Annan páskadag vóru tær í Miðvági og vitjaðu FS Vágar, og heldur óvæntað endaði dysturin við málleysum javnleiki. Úr Vágum verður sagt, at dysturin ikki var ein av teimum betru, og at langt var millum málmøguleikarnar.

B36 var tættast við at ogna sær tey trý stigini, men vantandi nærlagni frammanfyri málinum hevði við sær, at dysturin endaði við javnleiki.

## KÍ sannførandi

Á Krossinum í Sumba, hevði Sumba vitjan av greipuvinnarunum úr Klaksvík. KÍ vann heili 9-0, og hevur í teimum fyrstu umførunum ikki skotið færri enn tjúgu mál. Dysturin var einvegis ferðsla, og úrslitið prógvaði enn einaferð, at stórur munur er á oddi og botni í kvinnudeildini.

## B68 vann

Á Svangaskarði brustu B68 og GÍ saman. GÍ var frammanfyri tvær ferðir í dystinum, men kortini vóru tað toftakvinnur, ið vóru omaná, tá avtornaði. Dysturin endaði 3-2 til B68, eftir hálvleiksstøðuna 1-0 til GÍ. Av Toftum verður sagt, at dysturin var rótutur, og lítið skipað spæl var at síggja .

## Tveir útsettir dyst

Eins og í fyrsta umfarið vóru bert tríggir dystir avgreiddir í kvinnudeildini. Sum skilst, so hevur B71 trupulleikar at mannað lið, og tí hava teir ikki spælt nakran dyst enn. Tað sama er galdandi á Argjum, har fleiri av leikararunum eru uttanlands, og tí hava tær framvegis ikki spælt enn.

**2.umfar í tølum:**

**B68-Gí 3-2 (0-1)**
0-1 Heidi Heinesen
1-1 Maibritt Olsen
1-2 Hansa Mikkelsen
2-2 Mary-Ann Isaksen
3-2 Elin Jacobsen

**FS Vágar-B36 0-0 (0-0)**

**Sumba-KÍ 0-9 (0-4)**
0-1 Vivian Bjartalíð
0-2 Malena Josephsen
0-3 Bára S. Klakstein
0-4 Rannvá Andreasen
0-5 Vivian Bjartalíð
0-6 Bára S. Klakstein
0-7 Maria við Neyst
0-8 Maria við Neyst
0-9 Vivian Bjartalíð

**HB-AB útsettur**

**EB/Streymur-B71 útsettur**

# Dupultkapping á páskum



*Vinnarar av simultan-kappingini á páskum gjørdust Per Kallsbarg og Dánjal Pauli Mohr*

**Tvær stórar kappingar í Bridge hava verið í Bridgehúsinum í Havn um páskirnar**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Mikukvøldið fyri páskir luttóku heili 24 føroysk pør í einari altjóða simultan kapping, nevnd Easter Simultan 2003. Kappingin, ið Bridgedeild Kaggans skipaði fyri, var sera væl frágingin, og vóru luttakarnir væl nøgdir. Umleið 1000 pør luttóku í kappingini world wide. Besta føroyska úrslitið fingu Dánjal Pauli Mohr og Per Kallsberg við 63,5 %, og hetta rakk til eitt samlað 25 pláss, sera flott.

Tað er í ár 35 ár síðan, at Føroya Bridgesamband varð stovnað. Í tí sambandinum skipaði FBS annan páskadag, væl stuðlað av Samkeyp, P/F Poul Hansen og Thomas Dam Búnýti fyri parakapping til frama fyri landsliðini, ið skulu luttaka í EM í Malmø í 2004. 12 pør møttu til kappingina, ikki so galið um hugsað verður um tað góða veðrið, sum hevur verið teir síðstu dagarnar. Kappingin var skipað sum ein barometurkapping, 11 umfør á 3 spøl. Bogi Simonsen og Rói á Rógvu Joensen løgdu hart út og førdu kappingina líka til síðsta umfar, tá ið Arnbjørn Sivertsen og Hans Jacob Petersen komu uppá sama stigatal. Av tí at Arnbjørn og Hans Jacob vunnu innanhýsis umfarið móti Boga og Róa, gjørdist teir vinnarar.

**Úrslitini annan páskadag:**
(pørini yvir miðal)

| | |
|---|---|
| 1. Arnbjørn Sivertsen — Hans J. Petersen | 27 |
| 2. Bogi Simonsen — Rói á Rógvu Joensen | 27 |
| 3. Hanus Bærentsen — Steingrim Weihe | 20 |
| 4. Magni Jøkladal — Allan D. Christiansen | 14 |
| 5. Súsanna Dam — Súsanna Martinsdóttir | 8 |
| 6. Per Kallsberg — Dánjal Pauli Mohr | 5 |
| 7. Jens Pauli G. Nolsøe — Kaj Alstrup | 3 |
| 8. Henriette Svenstrup — Oddmar Danielsen | 2 |

Tað at parakapping er ørvísi enn liðkapping, er hetta spælið eitt gott dømi um. Spælið er frá páskakappingini hjá FBS.

2 hj vinnur, men eg fór 4 niður í 2ut X til 1100 og fekk ein reinan botn. Í liðkapping hevði hetta kostað sera dýrt, men í parakapping er tað minsta ein kann fáa ein botnur, ið kann vinnast inn aftur í næsta spæli við einum yvirstikki.

**Mín hond:**

| | |
|---|---|
| Sp: | D965 |
| Hj: | 76 |
| Rú: | E1086 |
| Kl: | E108 |

**Meldingarnar:**

| Bogi | Magni | Rói | Allan |
|---|---|---|---|
| N | E | S | V |
| | | | 1kl |
| P | 2rú1) | 2hj | Dbl |
| 2ut ? | P | P | Dbl |
| A.p | | | |

1) veik hond við 6 liti í rút.

Magni Jøkladal spældi kleyvara 6 út og eg sá hesa hondina:

| | |
|---|---|
| Sp: | E83 |
| Hj: | KB98532 |
| Rú: | - |
| Kl: | D32 |